VIÐMERKINGAR

# Mikladals kommuna

**– Hvat batar tað menniskjanum at vinna allan heimin og bøta við sál síni!**

Abraham Mikladal



Hesið orð úr Halgubók fullu mær í huga, tá ið eg las eina blaðsamrøðu við bygdaráðsformannin í Mikladals kommunu, Markus í Norðnástovu. Tað hevur eydnast honum og bygdaráðnum at "spara" nakrar krónur í kommunukassanum, men úrslitið er, at støðan er blivin so ótolandi, at hann umhugsar at flyta burtur. Hvat er tá vunnið við at eitt sindur djypri er í kommunukassanum, tá hvørki hann ella onnur trívast í kommununi?

**Søgan í stuttum**
Skúlin á Trøllanesi er ongantíð formliga niðurlagdur/stongdur. Tað at einki skúlabarn var eftir á Nesi ella tað at síðsta barni var tikið úr skúlanum, kann ikki metast sum skúlaniðurlegging. Sjálvsagt má metast bæði rætt og rímiligt, at tá børn aftur vóru norðuri á Nesi í skúlaførum aldri, ja, so kundi tey blíva undirvíst har á sama hátt sum fyrr, um ynski var um tað.

Til næstseinasta bygdaráðsval komu fleiri úr Trøllanesi í bygdaráðið, soleiðis at tey høvdu meirilutan, men ikki bygdaráðsformannin. Eitt av málunum, ið tey settu sær fyri, var at fáa skúlan á Nesi tiknan í nýtslu aftur. Tey valdu eina hóvliga linju. Ístaðin fyri at taka skúlan í nýtslu beinanvegin, valdu tey at geva tol og fara undir ábøtur yvir 2 – 3 ár og so taka skúlan í nýtslu.

Peningur var settur av á hvørjum ári til ymisk endamál, so sum tak, vindeygu, oljufýr, innrættan og innbúgv, MEN arbeiðini blivu bert lutvís sett í verk, orsakað av at bygdaráðsformaðurin Herfríð Sørensen (í Norðnástovu) "súltaði" uppgávurnar. Úrslitið bleiv, at skúlin ikki kom í tann stand, sum var ynskiligur frá meirilutans síðu, áðrenn tíðarskeiðið hjá bygdaráðnum var runnið. Tí avgjørdi meirilutin stutt undan at tey løgdu frá sær, at skúlin skuldi takast í nýtslu aftur. Tey sóu ivaleyst skriftina á vegginum.

Við seinasta bygdaráðsval var skúlin sostatt blivin eitt høvuðstema, og av ymiskum orsøkum, sum í bakspeglinum kunnu tykjast óklókar, valdi eingin á Trøllanesi at stilla uppaftur. Úrslitið bleiv sjálvsagt, at bert umboð úr Mikladali sita í bygdaráðnum í dag. Tey bóru skjótt at, ov skjótt og ikki sambært reglunum meta fleiri, og avgjørdu at skúlin á Trøllanesi ikki skuldi latast uppaftur.

**Løgfrøði**
Henda avgerðin hevur ført við sær ein løgfrøðiligan orðadrátt, sum enn ikki er liðugur.

Eftir hvat skilst, so verður málið lagt fyri løgtingsins umboðsman og kanska fyri landsstýrismálanevndina við. Eftir mínum meting er nógv meira enn løgfrøði í hesum málið. Sjálvsagt skulu lógir og reglur verða fylgdar, men av og á skal meira til.

**Fíggjarviðurskifti**
Grundreglan eigur sjálvsagt at verða, at eitt bygdaráð umsitur skattapeningin, ið kemur í kommunukassan so skynsamt sum gjørligt (cost/bennefit). Men eisini her skal stundum meira til og onnur atlit takast. Hvat nyttar tað, at kommunukassin stendur til at bresta, ella at peningurin verður nýttur á ein slíkan hátt, at borgararnir ikki trívast?

Og júst her liggur ein av trupulleikunum (undanførslunum). Bygdaráðið skjýtur seg innundir og heldur fast um, at avgerðin um ikki at taka skúlan á Trøllanesi í nýtslu aftur, er røtt útfrá einum fíggjarligum sjónarmiði. Tey hava óiva rætt í, at tað er bíligari í krónum og oyrum at reka ein skúla heldur enn tveir, men samstundis gjalda tey ein ógvusligan prís, ið ikki kann gjaldast í krónum og oyrum. Trivnaðurin er burtur, sálarfriðurin somuleiðis.

**Semja og loysn**
Fyri at talan kann verða um eina semju, so mugu báðir partar geva seg og møtast á miðjuni ella tætt við. Í trætuni um skúlan á Trøllanesi hevur bert annar parturin higartil víst vilja til at samráðast og harvið slaka í sínum krøvum. Tað eru foreldrini á Trøllanesi. Tey hava roynt at koma á tal við bygdaráðið fyri at finna eina semju, men uttan úrslit. Hinvegin heldur bygdaráðið, sambært bygdaráðslimin Christian Andreasen, fast við, at tað er bert er ein loysn á málinum, og hon er, at tey á Trøllanesi skulu sleppa øllum sínum ynskjum/krøvum.

Tað hava verið gjørdar nógvar royndir at tosa partarnar til sættis, og eitt nú møguleikin fyri fleiri frálærutímum, eins og onnur tilboð, ið kundu lætt um fíggjarliga og givið eina betri og meira spennandi frálæru, hava eisini verið frammi.

Sum dømi uppá fólk, ið hava roynt semju kunnu nevnast:
Torbjørn Jacobsen, landsstýrismaður
Óli Holm, landsstýrismaður
Olga Biskopstø, útoyggjasamskipari
Vilhelm Johannesen, løgtingsmaður
Karsten Hansen (landsstýrismaður)
Hans Eiler Hammer, prestur
Anfinn Kallsberg, løgmaður
eins og mong onnur við tilknýti til bygdirnar.

**Niðurstøða**
Tað er eingin loyna at bygdaráðið, enn í øllum førum, situr við teimum sterkastu kortunum á hondini, og kann gera tað tí lystir, men alt týðir uppá, at hetta er eitt boomerang, sum nú rakar tey aftur í høvdið. Bygdaráðið hevur bert havt eitt atlit í hesum málið, og er tað egnan tørv fyri seg og síni børn. Men prísurin tikist nú at verða vorin so høgur at tey hava mist meira fyri minni. Tí skal mín inniliga áheitan til bygdaráðið verða, at tað setir seg við samráðingarborðið og saman við teimum á Trøllanesi og møguligum semingsfólki finnur eina sámuliga loysn. Higartil hava bert verið taparar og eingir vinnarar.

# Viðmerking til Kjartan Hoydal - fyrrverandi ópolitiskur embætismaður

Edmund Joensen



Tað er ikki lukkuligt sum Kjartan Hoydal, fyrrverandi fiskivinnustjóri í landsstýrinum, hevur fingið ilt í afturpartin av tí sum Eilif Samuelsen segði í einum fyrilestri, hann var biðin at halda á skeiði fyri embætisfólk í allmennu fyrisitingini.

**Fyrilesturin var um samspælið millum politikarar og embætisfólk.**
Á ein sera kvalifiseraðan hátt tók Eilif dømir fram sum verandi í grásonuni, ella á markinum, millum æmbætisførslu og politikk. Eilif kemur í sínum fyrilestri eisini inn á umskipanina í almennu fyrisitingini. Hann grundgevur í egnum royndum sum landsstýrismaður fyri, hvussu neyðug hon var at seta í verk, og hvussu væl hetta eydnaðist. Hann kallar tað, sum Finn Normann Christensen fekk á skafti í so stutta tíð, fyri onki minni enn eitt bragd. Sum altíð, var Eilif sakligur, beinrakin og ákærdi heldur ongan í umsitingini. Hann var eisini ópolitiskur.

Tað er meira enn ein kann siga um ta skortflongjuna, sum Kjartan Hoydal ber fram í fjølmiðlunum. M.a. verði eg sum løgmaður skuldsettur fyri at hava forbrotið meg á nærum øllum økjum, tað verið seg innan normeringar, játtanir á fíggjarlógini, tænastumannalógina og aðrar sáttmálar á arbeiðsmarknaðinum.

**Fyrrverandi ópolitiski embætismaðurin og Finn Normann Christensen.**
Í tí eina brotinum skrivar Kjartan Hoydal soleiðis .

*”Hesin embætismaður hevði bara eina polittiska uppgávu. Tað var fyri táverandi løgmann Edmund Joensen at bróta niður tað umsiting, sum var, og seta í staðin eina skipan, sum var skrivað av eftir skipanum í londum við heilt øðrvísi tørvi enn Føroyar.”*

Àlvara tos. Fyri tað fyrsta vóru hetta ikki nøkur serpolitisk ynski hjá mær ella Sambandsflokkinum, men eg tori at siga, at tað var eitt krav hjá øllum teimum politisku flokkunum. Hetta var neyðugt út frá teimum samtyktum, sum Løgtingið tvey fylgjandi valskeiðir hevði framt.

Kjartan Hoydal átti at verið tann fyrsti at vita, at vit tá høvdu eitt kollegialt stýri, og at umboð fyri 4 politiskar flokkar stóðu aftan fyri ta avgerð, sum samlaða landstýrið tók. Eg hevði sum løgmaður umsitingina og ábyrgdina fyri, at arbeiðið bleiv gjørt skjótast møguligt. At tað ikki passaði summum æmbætismonnum at gera neyðugar broytingar, tað undirstrikar bert, at tað var rætt at taka sær serkøna og objektiva hjálp uttanífrá.

Uppgávan var at finna fram til hóskiligar og bíligar loysnir, sum hóskaðu til føroysk viðurskifti, og sum samstundis høvdu tey elementini í sær, sum stýrisskipanin legði upp til, og sum kundu tryggja landsstýrismonnum rímulig arbeiðskor. Løgd varð ein ramma, sum gav allar møguleikar fyri einara bíligari og vælvirkandi skipan, sum líðandi kundi lagast til tær broytingar, sum alla tíðina henda.

**Fýraflokkalandstýrið**
Tá ið vit fýra flokkarnir komu út í landstýrið, tøktist tað sum ongin umsitingarlig leiðsla var í Tinganesi. Tað tóktist sum tann sterkasti royndi at tiltuska sær mest møguligt vald.

Føroya land var tá í einum slagi av undantakstøðu eftir húsagangin. Tá var tað bæði neyðugt og heppið, at samgongan hevði rygg til at gera tær neyðugu broytingar, sum skuldu til, eisini broytingarnar og tilagingar í allmennu fyrisitingini.

Eg eri sera glaður fyri, at tað so skjótt eydnaðist at skapa Føroyum neyðugar karmar um eina nýggja nýmótans umsiting. Tað eydnaðist eisini landstýrinum at útvegað neyðug hølir, at innføra ein starvsfólkapolitikk, innlit og opinleika í umsitingina og nógv annað.

Hetta var onki minni enn eitt bragd og eitt lop inn í framtíðina, eru tey flestu av teimum sum nú starvast í almennu umsitingini samd um.

**Skemt og nalvaskoðan**
Eg taki tað sum skemt og nalvaskoðan tá Kjartan Hoydal tosar um hvørjir partar av umsitingini eru føroyskir og hvørjir ikki. Sambært Kjartan Hoydal so er Oljumálastýrið einasta økið, sum er føroyskt. Hóast tað er væl skiljandi, at Kjartan Hoydal er serliga fegin um Oljumálastýrið, so noyðist eg at gera vart við, at tað sum hent er, er at oljumáladeildin undir Vinnumálastýrinum er skild út sum eitt serstakt stýri í sambandi við at 8. landsstýrismaðurin varð settur. Um tað er serføroyskt ella ikki, kann ein altíð kjakast um. Heldur er hetta eitt prógv um, at tað eydnaðist at gera eina rammu sum gjørdi tað møguligt at fáa umsitingina dynamiska og fleksibla.

**Rætt skal verða rætt**
Eg fari at geva Kjartani rætt í einum. Tann føroyska ramman, sum skapt varð, er vorðin óhugnaliga nógv tambað seinastu árini. Núverandi løgmaður hevur ikki duga sær hógv. Tvey stýrir eru komin afturat, Oljumálastýrið og Sjálvstýrisumsitingin. Tveir landsstýrismenn til ein polittiskan flokk við bert tveimum eykavaldum tingmonnum, tað sigur alt um hugburin. Alt í alt er kostnaðurin av almennu høvuðsumsitingini uppá fýra ár farin úr 53 milliónum uppí 105 milliónir kr. um árið, ella sum Kjartan Hoydal sjálvur sigur umleið 100 %. Hetta líkist ongum!

Og tað steðgar heldur ikki her. Tí løgmaður hevur m.a. sagt seg hava ætlanir um bæði eina serliga kommunuumsiting afturat og ein serligan landstýrismann fyri útoyggjarnar, sjálvandi við umsitingarligum vøkstri. Nýggjar og vaksandi yvirtøkur koma sjálvsagt at krevja økta umsiting so tað forslær.

Hvussu serføroyskur vøksturin í almennu umsitingini er og ikki, tað kunnu aðrir meta um. Men at vøksturin tey seinastu árini hevur verið óhugnaliga og óneyðuga stórur, og at hann heldur fram, tað hevur ongin loyvi at ivast í.



# New Foundland tikið næsta oljufeltið í brúk




*Hibernia, fyrsti oljupallurin við strendur New Foundlands*

**Í hesum døgum hevur ein av Atlantsgrannum okkara, New Foundland, tikið í nýtslu næsta stóra oljufeltið, og fyrireikingar verða gjørdar til tað triðja. Áhugavert er eisini hjá føroyingum at fylgja tilgongdini í New Foundlandi, tí fleiri av spurningunum, sum taka seg upp har í sambandi við oljuvinnuna, líkjast tí, ið vit longu umrøða og fara at umrøða í Føroyum**

OLJUFRAMLEIÐSLA Í ATLANTSHAVI

*Jan Müller*

Eitt av grannalondum okkara, tó at tað liggur langt burturi, New Foundland, hevur í hesum døgum tikið enn eitt týðandi stig sum oljutjóð. Í farnu viku fóru newfoundlendarar undir at framleiða olju frá tí næstu kelduni á Grand Banks út fyri New Foundland. Keldan hevur fingið heitið Terra Nova.

Tað hevur kostað ikki minni enn umleið 18 milliardir krónur at byggja hetta feltið út til framleiðslu. Keldan rúmar millum 400 og 500 mill. tunnur av olju. Talan hevur verið um eina rættiliga torføra og drúgva verkætlan. Hon skuldi fara av bakkastokki seint í ár 2000 men er av ymsum orsøkum seinkað. Hetta hevur dýrkað hana nógv. Ein av orsøkunum til seinkingina hava verið ymisk brek eitt nú við oljútbúnaðinum á havbotninum.

Meðan tann fyrsta oljukeldan við New Foundland, Hibernia, varð bygd út við einum risastórum palli, so verður FPSO modellið brúkt í hesi næstu kelduni, tvs. eitt framleiðslu- og goymsluskip av sama slag sum tey, ið BP brúkar á Foinaven og Schiehallion feltunum á Atlantsmótinum skamt frá okkara marki. Hetta er so fyrstu ferð í oljusøguni, at eitt slíkt skip er brúkt í einum so harðbalnum, veðurbardum og torførum djúpvatnsøki.

Fyritøðufelagið (operatørurin) í hesi verkætlanini er kanadiska oljufelagið Petro-Canada. Haraftrat eru Exon-Mobil, Norsk Hydro og Texaco við.

Hiberniafeltið, sum varð tikið í nýtslu í 1997, og sum var tað fyrsta framleiðandi feltið út fyri New Foundland, hevði eisini eina drúgva føðing. Tað varð funnið í 1977 og skuldu ganga heili 20 ár, áðrenn komið varð á mál. Ein orsøkin til at hetta tók so langa tíð var tann, at man vildi finna tí røttu pallloysnina, sum hóskaði til júst hetta ísherjaða økið. Hiberniapallurin, sum varð í gerð í mong mong ár, er tí eisini eindømi innan oljuvinnu.

*framhald á síðu 14*



*Terra Nova, framleiðslu- og goymsluskipið, sum nú er tikið í brúk á Grand Banks út fyri New Foundland*